# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Svartkalvi. Túrur nr. 0640.
# Tíðarskeið: 24/5-7/6 – 2006.

**Fólk við frá Fiskirannsóknarstovuni:** Rógvi Mouritsen, Petur Steingrund, Marit Pedersen, Lis Larsen og Davíð Tómas Davíðsson (frá íslendska universitetinum).

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skuldu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum, sum vóru fingin.
Eisini var hitin við botn skrásettur. Davíð tók prøvar av mongum fiskasløgum til DNA-kanningar.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper grunnur, breitlar 120 m og Thyborøn-lemmar. Trolað varð vanliga í 4 tímar.

**Um túrin:**
Fóru av Havnini 25/5 kl. 21. Vit byrjaðu eystur av Suðuroyarbankanum og fóru suður á endan á Munkagrunninum. Gjørdu síðan eitt legg í vestara kant á Munkagrunninum, men trupult var at fáa trolið at ganga. Garnabátar settu gørn í økinum, og tí var ringt hjá okkum at royna har. Fóru síðan aftur eysturum og fiskaðu allan vegin líka til økið norður úr Fugloynni. Tilsamans 56 hál vórðu tikin og 48 gjørd upp. Veðrið var gott allan túrin. Landaðu á Toftum 7/6 kl. 6.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 6. juni.

**Fyribilsúrslit:** Tað var tað sama at fáa av svartkalva í ár í mun til í fjør (Talva 1). Vit fingu eitt sindur minni av trantkongafiski og stóra kongafiski og toski. Tað var munandi meira at fáa av skøtu og blágómi í ár.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur tiknar á túri 0640. Veiðan er bert frá góðkendum hálum (48 í tali).

| FISKASLAG | Kg per 48 støðir | Nytrur | Kg per 42 hál í 2005 | KG per hál 2006 / KG per hál 2005 | KG per 42 hál í 2004 |
|---|---|---|---|---|---|
| SVARTKALVI | 10059.64 | 481 | 8379.92 | **1.05** | 11556.93 |
| TRANTKONGAFISKUR | 8683.43 | | 9075.62 | **0.84** | 8284.03 |
| UPSI | 4220.69 | | 4082.39 | **0.90** | 3510.84 |
| TINDASKØTA | 2008.57 | | 1715.17 | **1.02** | 1715.28 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 1317.46 | | 1372.57 | **0.84** | 3116.49 |
| HALAHVASSA SKØTA | 1152.12 | | 163.39 | **6.17** | 105.28 |
| TOSKUR | 876.98 | 65 | 1043.01 | **0.74** | 1139.92 |
| BLÁGÓMUR | 754.57 | | 271.91 | **2.43** | 324.26 |
| HVÍTASKØTA | 657.50 | | 8.48 | **67.84** | 20.19 |
| BROSMA | 306.55 | | 344.56 | **0.78** | 378.24 |
| GULLAKSUR | 182.94 | | 50.05 | **3.20** | 32.12 |
| HAVTASKA | 182.23 | | 0 | | 0 |
| LIRI | 176.96 | | 85.09 | **1.82** | 110.42 |
| LÁLLA | 150.84 | | 53.39 | **2.47** | 37.31 |
| BLÁLONGA | 116.74 | | 46.94 | **2.18** | 64.24 |
| LONGA | 80.83 | | 78.13 | **0.91** | 10.13 |
| SVARTKJAFTUR | 71.55 | | 244.02 | **0.26** | 166.66 |
| HVASSASPREK | 65.38 | | 45.93 | **1.25** | 76.97 |
| ÍSHAVSSKØTA | 42.35 | | 25.85 | **1.43** | 112.7 |
| SKRAMBUL | 42.18 | | 61.62 | **0.60** | 44.6 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 36.36 | | 27.27 | **1.17** | 17.99 |
| KALVI | 33.23 | | 0 | | 0 |
| KLINGRUSKØTA | 21.29 | | 19.08 | **0.98** | 16.16 |
| ULVFISKUR | 17.83 | | 2.87 | **5.43** | 16.37 |
| HÝSA | 7.07 | | 0.78 | **7.93** | 0 |
| RÍSNA LANGASPORL | 6.84 | | 0 | | 0 |
| LÍTLA BROSMA | 6.72 | | 0 | | 0 |
| HAVMÚS | 5.15 | | 0 | | 0 |
| STEINBÍTUR | 3.32 | | 1.15 | **2.53** | 4.35 |
| GLASKVOYSA | 2.39 | | 0 | | 0 |
| RÆKJA | 2.29 | | 0.04 | **50.01** | 0 |
| HYDROLAGUS M | 2.05 | | 0 | | 0 |
| HÁVUR | 1.77 | | 0 | | 0 |
| HVÍTINGUR | 1.08 | | 0 | | 0 |
| KRYTTLINGUR | 0.62 | | 0.76 | **0.72** | 0 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 0.27 | | 0.22 | **1.07** | 0 |
| LITLA LAKSATOBIS | 0.22 | | 0 | | 0 |
| SILD | 0.22 | | 0 | | 0 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 0.20 | | 0 | | 0 |
| TILSAMANS | 31298.37 | 546 | 27200.21 | | 30861.48 |

**Viðmerkingar:** Imponatorprogrammið kann betrast enn meira. Tá ein vekt verður framvigað frá 200 kg vektini, er bert ein desimalur aftan fyri komma (og ikki tríggir). Ikki ber til at rætta vekt við at nýta manuella skráseting. Programmið steðgar, tá ein regla verður strikað og roynt verðu at gera nakað við eina reglu, sum er omanfyri. Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru at finna í Tur0640d.doc.

Petur Steingrund